DAGSINS MEINING

Krevur nógv av bá›um pørtum

Í gjár hittust umbo› fyri oljufeløgini, i› hava fingi› leitiloyvi vi› Føroyar saman vi› umbo›um fyri Oljumálast‡ri›. Hetta er fyrsti veruligi fundurin millum føroyskar oljumyndugleikar og fyristø›ufeløgini (operatørarnar), sí›ani loyvini vór›u latin fyri eini tí› sí›ani.

Tá loyvini vór›u latin seg›i landsst‡risma›urin í oljumálum, at loyvishavararnir høvdu bundi› seg til stu›la uppundir ymsar verkætlanir í Føroyum, sum m.a. høvdu til endamál at menna førleikan hjá føroyskum virkjum. Tilsamans høvdu feløgini játta› at lata knappar 100 mill. kr. til slík endamál.

Higartil hava vit fingi› líti› at vita um, hvat hesin peningurin í veruleikanum skal brúkast til, hvør hevur ábyrgdina av honum og hvørjar ringvirkningar hann kann fáa. Vit hava hoyrt, at bretska oljufelagi› BP vil seta pengar av til ein serstakan samskiftiska›al millum Føroyar og Bretland. Men í gjár var› so skjøtil settur á eitt av teimum stóru projektunum í hesum sambandi, nevniliga stovnsetan av grunni, sum skal taka sær av útbúgvingarmálum í sambandi vi› eina komandi oljutilgongd. Ta› skilst, at ein stórur partur av teimum 100 mill. kr. skal kanaliserast nettupp yvir í útbúgvingarmál av ymsum slag. Hvussu hetta skal gerast var› vi›gjørt á fundinum í Oljumálast‡rinum í gjár.

Vit eiga at fegnast um, at peningaorka ver›ur tøk til at menna føroyska samfelagi› út um ta›, sum ver›ur sett av á okkara egnu fíggjarlóg. Ta› vilja altí› vera øki, sum fíggjarlógin ikki røkkur, og tá talan er um at skapa grundarlag fyri útlendskum feløgum, sum vilja gera íløgur her vi› tí vón, at tey fara at vinna pening, so er einki anna› enn náttúrligt, at tey eisini kenna ábyrgd mótvegis tí øki tey virka í. Ta› vil altí› vera ein spurningur um javnvág. Tvs. at føroyskir myndugleikar eiga at kunna seta útlendskum vinnufyrritøkum, sum vilja vinna pengar burtur úr møguligum føroyskum tilfeingi, krøv, men samtí›is má samfelagi› eisini skapa hesum fyritøkum ney›ugu karmarnar at virka undir.

Hóast føroyska samfelagi› hevur lætt vi› at umstilla seg til n‡ggjar avbjó›ingar, so er tó greitt, at avbjó›ingin, sum liggur í n‡ggju oljuuvinnuni, er so stór og øgilig, at ta› krevst nógv av føroyskum myndugleikum og vinnulívi. Ta› er tí altumrá›andi, at føroyingar standa saman heldur enn hvør í sínum lag at dyrka egináhugamál. Vit mugu standa saman - ikki sum andstø›a til útlendsku feløgini - men fyri at tryggja okkum, at naka› skilagott spyrst burtur úr fyri heildina eitt nú vi› at kunna veita mest møguligar tænastur á einum kvalitetsstø›i. Oljufeløgini mugu so eisini vísa forstáilsi, tí hetta er naka› n‡tt fyri okkum, og tí mugu tey vísa ein positivan vilja móti tí føroyska samfelagnum, eisini har hetta setir teimum eyka krøv.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Havnarkona á Kirkju sjeytifimm

Í dag ver›ur Bergtóra Jacobsen í Havn 75 ár. Bergtóra er fødd og uppvaksin úti á Kirkju í Fugloy, men kom sum ung genta til Havnar á kostskúla hjá nunnunum. Foreldur hennara vóru Karolina Matras dóttir S. M. Zachariasen og Gullak Matras bæ›i av Kirkju. Hon giftist í 1951 vi› Óla Simonsen, sonur Erik hjá Magnus Sivard. Tey búsettust tá úti í Grønlandi, har tey fingu tvey børn saman. Óli anda›ist í 1957, og tískil mátti hon út at arbei›a fyri at uppihalda hús og heim. Fyrst var hon krambakvinna í handlinum »Tubbak« hjá Christian Dahl Restorff, i› var á Áarvegnum, har Flogfelag Føroya er í dag. Tá handilin lat aftur, fór hon í skrivstovuarbei›i á Fiskasøluni. Har var hon fram til 1965, tá hon giftist uppaftur vi› Frits hjá Gøtu Anton, sum sjálvur var einkjuma›ur eftir Lilly Dam, systir Petur M. Dam sála: Tá flutti hon vi› mammu síni, sum var hjá henni, og bá›um børnunum út í J. C. Svabosgøtu. Men ikki var teimum teimum bá›um langt lív laga› saman. Tí longu í august 1967 doy›i Frits, og eftir sat Bergtóra vi› f‡ra børnum, harav tveimum dreingum, i› tey høvdu saman.

Í 1968 flutti hon út aftur í Grønland at búgva. Her tók hon ymisk arbei›i uppá seg, millum anna› vaska›i hon í fleiri ár í Kommunuskúlanum. Seinni, tá lagnan enn einafer› vildi ta› so, at heilsubrek fóru at gera um seg, var so heppin at fáa arbei›i hjá Postverk Føroya, sum um ta› mundi› kom vi› teim føroysku frímerkjunum. Hon fekk starv á Frímerkjadeildini. Har var hon til sín pensjónsaldur fyri ákkurát átta árum sí›an.

Men sum pensjónsnistur hevur hon onga løtu kett seg ella lati› tí›ina fari› til einkis. Tí húsi› er eins væl røkt innan sum uttan, eisini stykki› rundan um vi› blómum og runnum, sum um summari› stendur sum eitt prógv um ta› sama, sum ta› altí› hevur veri›. Ta› hevur hon gingi› sera høgt uppí, ta› veit ein og hvør, sum kennir Bergtóru. Eisini hevur hon havt tilkn‡ti til Meinigheitshúsi› og tess virksemi, og K.F.U.K. ikki at gloyma, har hon millum anna› hevur siti› í nevndini. So eru ta› sjómanskvinnuringurin og tílíkt, men altí› lítinlátin, hevur hon gingi› fremst til at taka eina hjálpandi hond í, hvat ta› so skuldi veri›.

At enda ver›ur ynskt henni tillukku vi› sjeytifimm ára degnum í dag og nógv gó› ár afturat. Dagurin ver›ur hildin hjá sonum Eiriki – vi› sí›una av, har hon b‡r, har børnini hava skipa› fyri.

Rani Nolsøe »business developer« Alnót

Rani Nolsøe í Klaksvík er settur sum »business developer« hjá n‡ggja telefelagnum, Alnót, í sambandi vi›, at felagi› fyrireikar seg til fjarskiftisvirksemi í Føroyum.

Rani Nolsøe skal í høvu›sheitum taka sær av at menna markna›arføringa, søluna og kundarøktina hjá felagnum.

Í tí›indaskrivi frá Alnót sigur Bjarni Askham Bjarnason, stjóri, at føroyingar í næstum fara at hava fleiri fjarskiftisveitarar at velja millum.

Hann sigur, at Alnót fer at markna›arføra allar vanligar tænastur á fjarskiftisøkinum, og tá i› øll loyvi eru fingi til vega, fer Alnót at bjó›a út sína egnu GSM-skipan í summar. Navni› »Alnót« kundi eisinin bent á, at felagi› eisini ætlar at bjó›a út tænastur, i› hava vi› alneti› at gera.

Bjarni A. Bjarnason sigur, at felagi› fer í sínum virksemi at tryggja føroysku brúkarunum kappingarførar prísir og tænastur.

Rani Nolsøe, sum m. a. er kendur úr tónleikabólkinum Frændum í Klaksvík, er sonur Lis og Eli Nolsøe, fyrrverandi landsst‡ris- og tingmann Sambandsfloksins. Rani starvast í løtuni sum menningarstjóri í Klaksvíkar kommunu. Hann er 41 ára gamal og tekur vi› starvinum í Alnót 1. januar komandi.

†

Vi› hesum ver›ur kunngjørt fyri ætt og vinum, at gó›a mamma, omma, langomma og vermó›ir okkara:

MAGDALENA JOENSEN (MENA)
Hvítanes

anda›ist í heiminum t‡sdagin 12. desember 2000, 73 ára gomul.

Fari› ver›ur úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 15. desember kl. 18, og jar›arfer›in ver›ur úr Havnar Kirkju leygardagin 16. desember kl. 13.

Fyri tey avvar›andi
Poul Åge, Marius, Andreas, Ey›un, Lena og Bergtóra

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, i› mintust okkum á gullbrúdleypsdegnum 5. november.

Blí›ar heilsanir og gle›ilig jól
Nicolina og Joen Jacob Thomsen

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Friggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Máttu avl‡sa útoyggjafund

Fer›asambandi› sveik, tá útoyggjanevndin skuldi hava seinasta fundin í Havn mikudagin

ÚTOYGGJAR
Ey›un Klakstein

Útoyggjanevndin mátti lúta, tá fer›asambandi› sveik mikudagin.

Ætlanin var at hava seinasta fundin hjá útoyggjanevndini, sum í løtuni skrivar frágrei›ing, í Havn, men bert helmingurin av teimum 10 limunum í nevndini møttu á fundinum.

Restin av nevndini noyddist at geva avbo›, tí tyrlan, sum skuldi heinta fólkini í millum anna› Fugloy og Svínoy, fekk ikki sett orsaka av ve›rinum.

– Vit, sum møttu á fundinum, tosa›u saman og gjøgnumgingi› nøkur ting, men vit fingu onga ni›urstø›u gjørt, tí helvtin av nevndini mangla›i, sigur Olga Biskopstø, sum er nevndarforma›ur og samskipari av arbei›num hjá nevndini.

Hon er í løtuni í holt vi› at skriva frágrei›ingina, og arbei›i› er komi› væl álei›is.

Seinka›

Løgma›ur hevur sett útoyggjanevndina at arbei›a vi› vi›urskiftunum, sum eru serlig fyri tey, sum búgva á útoyggj. Nevndin skal koma vi› ítøkiligum menningaruppskotum fyri útoyggjarnar og or›a ein menningarpolitikk.

Arbei›i› hjá nevndini er naka› seinka›, tí eftir ætlanini skuldi løgma›ur havt fingi› frágrei›ingina, men hann noy›ist nú at bí›a til januar mána›i, á›renn hann fær ni›urstø›urnar hjá nevndini.

Útoyggjanevndin fer mi›skei›is í næstu viku at gera eina n‡ggja roynd at halda nevndarfund.

Politikari og fakfelagsma›ur fyllir 75

Í dag fyllir vælkendi kommunalpolitikarin og fakfelagsma›urin Dánjal av Rana, b‡rá›slimur á Tvøroyri, 75 ár.

75 ÁRA FØ›INGARDAGUR
Áki Bertholdsen

Dánjal av Rana er føddur í Trongisvági, sonur Petru og Petur Karl Bech, hon var úr Húsavík og hann av Tvøroyri. Ta› var umlei› 1950, at hann fekk sær eftirnavni› »av Rana«. Orsøkin var, at hann hev›i tríggjar navnar á Tvøroyri og ta› var ofta, at blandingur bæ›i kom í post og alt møguligt anna›, so hann tók eftirnavn eftir sta›arnavninum, har barnaheim hansara stó›.

Nú Dánjal av Rana hevur rokki› høgan aldur, hevur hann eitt so fjølbroytt og virki› lív at líta afturá, sum bara er teimum allarfægstu beskori›.

Dánjal av Rana hevur arbeitt mesta partin av lívinum á landi. Men hann hevur kortini roynt sjólívi›, tí eitt stutt skifti var hann á su›urlandinum vi› Westward Ho.

Hann var eisini leingi í kolinum. Men tá i› tey mekanisku arbei›sambo›ini komu fram, fór hann at koyra traktor og broyt. Hann var leingi traktorførari hjá Landsverkfrø›inginum, og hann var vi› til at arbei›a uppá vegirnar í sambandi vi› tunlarnar til Hvalbiar og Sandvíkar. Men hann hevur eisini arbeitt fyri privatar arbei›stakarar, eitt nú var hann hjá Højgaard & Schultz, tá i› n‡ggja elverki› í Botnivar› bygt fyrst í sekstiárunum. Ta› var eisini hann, i› fekk hei›urin at leggja fyrsta steinin, tá i› stykki›, sum Tvøroyrar Flakavirki› var› bygt á, var› fylt út. Hann var eisini vi› til at byggja n‡ggju loranstø›ina á Eggjunum í Vági og bátahylin í Hovi.

Dánjal av Rana kom uppí fakfelagspolitikk fyrst í sjeytiárunum, tá i› hann kom í nevndina í arbei›smannafelagnum Fylking.

Í 1973 bleiv hann skrivari hjá felagnum. Men í 1982 bleiv hann valdur til formann í Fylking, og hetta starvi› røkti hann líka til 1997, tá i› hann bo›a›i frá, at hann tók ikki vi› afturvali›. Í 1977 var› søkt eftir fólki at standa fyri løngjaldsstovuni hjá Fylking. Dánjal av Rana søkti og fekk starvi› og ta› røkti hann eisini til 1997, tá i› hon var› ni›urløgd. Sostatt var hann virkin fakfelagsma›ur í 25 ár.

Dánjal av Rana er eisini royndur kommunalpolitikari. Hann var› valdur í Tvøroyrar B‡rá› í 1976 og har situr hann enn. Men tær bá›ar seturnar, frá 1984-1992, var hann eisini b‡rá›sforma›ur. Á valinum hesufer› var› hann ikki afturvaldur og leggur sostatt frá sær nú á n‡ggjárinum, eftir 24 ár í b‡rá›num.

Umframt ta›, sum er nevnt omanfyri, hevur Dánjal av Rana havt eina ørgrynnu av ø›rum álitisstørvum.

Hann var nevndarlimur og forma›ur í Tvøroyrar Flakavirki øll árini, hann er forma›ur í Útger›arfelagnum, sum eigur ábyrgdarpening í trolaranum, Su›ringi, umframt at ta› hevur anna› útger›arvirksemi. Og hann er somulei›is forma›ur í felagnum Vør›uni, sum eigur trolaran Rankan.

Tá i› í› líkningarnevndirnar blivu settar á stovn í 1959, bleiv Dánjal av Rana eisini limur í nevndini á Tvøroyri og har sat hann í 20 ár, tey sí›stu árini var hann forma›ur.

Sum b‡rá›spolitikari, hevur hann eisini veri› umbo›slimur í SEV í fimm valskei›. Hann umbo›a›i eisini Tvøroyar Kommunu í Kommunufelagnum, líka fra tí hann kom í b‡rá›i› til í fjør, tá i› Tvøroyri fór úr felagnum, tvs í 23 ár. Í Kommunufelagnum var hann næstforma›ur øll árini. Størsta taki›, Dánjal av Rana var vi› til hesi árini, var at fáa ruskfelagi›, IRF, á føtur og at virka eftir ætlan. Hann hevur eisini veri› limur í Metingarnevndini í næstan 30 ár, og er ta› enn.

Og nú hann er blivin pensjónistur, er hann eisini blivin forma›ur í felagnum, sum stendur fyri Snaruni, sum er undirhúsi› á Tvøroyri, og hann er somulei›is limur í Eldrará› Føroya.

Dánjal av Rana heldur 75 ára fø›ingardagurin í Havn, hjá soninum, Jenisi av Rana, saman vi› konu og børnum.

Eingin avger› tikin

Enn er ikki greit, hvat t‡ska skipasmi›jan fer at gera, eftir at Smyril Line ikki kundi veita kravdu trygdina

SMYRIL LINE
Ey›un Klakstein

Enn er ikki greitt, hvat t‡ska skipasmi›jan fer at gera, eftir at Smyril Line hevur sagt frá, at felagi› ikki kann veita kravdu trygdina

Einki er at frætta um, at samband hevur veri› millum Smyril Line og t‡sku skipasmi›juna, sum skal byggja n‡ggju Norrønu.

Ta› eydna›ist okkum ikki fyrrapartin í gjár at fáa fatur á stjórunum á Smyril Line og skipasmi›juni í Flensburg.

Mikukvøldi› seg›i Óli Hammer vi› Útvarp Føroya, at Smyril Line ikki hev›i hoyrt frá t‡skarum, eftir at felagi› gav skipasmi›juni bo›ini um fíggjarligu trygdina t‡sdagin.

Kundu ikki veita trygdina

T‡ska skipasmi›jan hevur kravt Smyril Line eftir størri trygd, um teir skulu halda fram vi› byggingini av n‡ggju Norrønu, men Smyril Line kundi ikki veita ney›ugu trygdina.

Hetta bo›a›i Smyril Line skipasmi›juni frá t‡sdagin á middegi, tá teir í Flensburg høvdu sett freist fyri at fáa trygdina.

Smyril Line hevur seinastu tí›ina roynt at bøtt um fíggjarorkuna, men hetta hevur ikki eydnast. Allir lánveitararnir – uttan Kaupthing – hava svara› nei til Smyril Line, og landsst‡ri› nokta›i eisini fyri at lata eitt ve›hald.

Strí›ast um treytir

2000 hevur veri› eitt av verru árunum hjá Smyril Line, og hetta hevur havt vi› sær, at felagi› ikki hevur klára at goldi› t‡sku skipasmi›juni avdráttirnar eftir sáttmálanum.

Smyril Line hevur roynt at fingi› avdráttirnar settar ni›ur, men t‡ska skipasmi›jan hevur afturmóti kravt størri trygd.

Nú Smyril Line hevur svara› skipasmi›juni er spurningurin, hvat fer at hendaví›ari í málinum. T‡ska skipami›jan hevur hótt vi› at ste›ga byggingini av n‡ggju Norrønu og at draga gomlu Norrønu inn fyri skuld.

Hetta seinasta avvísir Óli Hammer skal bera til næstu nógvu árini.

ÁLMANAKKIN 2001

- ein bílig og viðkomandi jólagáva -

Í samfull 73 ár hevur Álmanakkin á so mangan hátt verið álitið hjá fólki á sjógvi og landi úti sum heima. Haðani hevur tú altið fingið svar uppá spurningar um eitt nú dagar og mánaðar, sól og mána, skip, bátar og streym.

Álmanakkin 2001 inniheldur umframt alt tað vanliga, nýteknaði streymkort, kort yvir hagapartar, oljuloyvi, alivinnuna og føroyskar havnir.

Bókin er prýdd við litum og er 320 blaðsíður. Enn sum áður er Álmanakkin ein bilig bók. Óinnbundin kostar hann einans 125 krónur, meðan innbundna útgávan kostar 175 krónur.

Streymkort, kort yvir hagapartar, oljuloyvi, alivinnuna og føroyskar havnir.



Pf. H.N. Jacobsens Bókahandil
Tel +298 31 10 36 · P.O. box 55 · FO-110 Tórshavn
e-mail: hnj-book@post.olivant.fo